# Gávu fyri hegni og nýskapan

MENTAN

Nevndin í Grunni Thorvalds Poulsen av Steinum hevur á fundi gjørt av, at í 2003 verður gávan, kr 60.000, latin Tróndi Bogasyni Hansen, tónasmiði. Gávugóðs úr Grunni Thorvalds Poulsen av Steinum verður givið ungum við listarligum gávum til útbúgvingar.

Tróndur Bogason Hansen hevur víst hegni og nýskapan, tá ið talan er um nýggjari partiturtónleik, og hansara fjølbroytta arbeiði við tónleiki skarar framúr. Hann hevur spælt violin hjá Erik Petersen og í nógv ár klaver hjá Bjarna Restorff. Hann hevur gingið á kompositiónskeiðum hjá Sunleif Rasmussen. Í rockbólkinum MC-hár hevur Tróndur Bogason spælt og gjørt løg, og hann hevur lagt til rættis annan rútmiskan tónleik. Í 1999 fór Tróndur at lesa á komponistbreytini hjá Det kgl. danske musikkonservatorium.

Tróndur Bogason Hansen hevur vunnið eina kapping um at skriva ein sats til Tórshavnar manskór og í 2000 fekk hann fyrstu virðisløn í kapping um at skriva eina nýggja ólavsøkukantatu. Fleiri verk hjá Tróndi Bogasyni hava verið frumframførd á Summartónum, og hann skrivaði setanarverkið til Listastevnuna í 2002

Grunnur Thorvalds Poulsens av Steinum frøist um at kunna stuðla listarligu útbúgving og menning hansara við hesum gávugóðsi. Í nevndini eru Oddfríður M. Rasmussen, Elsa Birgitta P. Petersen og Malan Marnersdóttir.



*Tróndur Bogason Hansen fekk gávugóðs*
*Mynd Jens K. Vang*

Betri tænasta til okkara vinnukundar.




- Øll vanlig eftirlit verða ókeypis næstu fýra árini ella upp til koyrdar 100.000 km., tað vil siga fyrstu koyrdar km. 25.000, 50.000, 75.000 og 100.000.
- Møguleiki skal verða fyri at fáa eftirlit, oljuskift og dekkskifti gjørt mikukvøld, soleiðis at bilurin er klárur aftur hósmorgun.
- 20% í avsláttri uppá allar eykalutir, dekkkeyp og oljuskift.
- Í samband við dekkskifti fáa tygum møguleika fyri at goyma reserva-dekkini á okkara nýggja dekkhotellið.

P/F Wenzel

Tað loysir seg at verða vinnukundi hjá okkum.
www.wenzel.fo, Akranesgøta 5, tlf. 354500.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið hava hjálpt og stuðlað okkum á so mangan hátt ígjøgnum hesa sváru tíð, síðani vit mistu okkara høgt elskaða son, pápa, bróður, svág og pápabeiggja

**Gudmund Lindenskov Joensen**

Tøkk fyri heilsanir, vitjanir, blómur og kransar

*Vegna familjuna*
**Rannvá, Tummas, lítla Rannvá, Kathrina, Jógvan Edvard og Hanna**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu, tá okkara kæri pápi, verpápi og abbi

**Hans Jacob Debes**
Tórshavn

doyði og varð jarðaður.
Takk fyri blómur og góða hjálp.
Ein serlig tøkk til starvsfólkið á B6.

*Vegna familjuna*
**børnini**

TASKI tapiset bustdustsúgvari DEMO

Up-right dustsúgvari við skjóttmalandi bustirullum, sum tryggja at fasttraðkaður, turrur skittur verður sogin upp. Ljósábending um at bustin er rætt innstillað. Súgvievni flytist av sær sjálvum við slanguni, tá hon verður tikin av, so tað er skjótt at skifta millum at vaska gólv og at dustsúgva innbúgvið.



Vanligur prísur kr. 4.456,00

TILBOÐ: kr. 3.084,00 (bert eitt eintak)

A. H. Jensen



# Fólkaflokkurin fer lætt um sannleikan

**Tað er beinleiðis skeivt, tá Fólkaflokkurin í brævi til danska forsætisráðharran sigur, at Saddam Hussain hóttir trúarfrælsið, sigur limur í adventistasamkomuni í Havn**

TRÚARFRÆLSI
*Edvard Joensen*

Tá ein sendir bræv til forsætisráðharran og ákærir fólk fyri eitthvørt, eiga ákærurnar at vera sannar. Tað eru tær hjá Fólkaflokkinum ikki, tá flokkurin leggur Saddam Hussain og stjórnina í Irak undir at hótta trúarfrælsið, sigur Thorbjørn Brochs, sum er limur í adventistasamkomuni í Tórshavn.

–Tað undrar meg, at eingin hevur víst á tað beinleiðis skeiva í útmeldingini hjá Fólkaflokkinum, tá hann leggur Irak undir at hótta trúarfrælsið, sigur Thorbjørn Brochs. Tí eg veit, at Irak er einasta muslimska landið yvirhøvur, sum virðir trúarfrælsið.

Thorbjørn Brochs vísir á, at sjálvt ein so lítil samkoma sum Adventkirkjan í Irak, hevur egnar kirkjur, egnar skúlar og frí á sabbatsdegnum. Stjórnin í Irak hevur avgjørt, at tað er umráðandi, at minoritetirnar ikki verða gloymdar, sigur hann.

–So tá Fólkaflokkurin brúkar hóttan móti trúarfrælsinum sum grundgeving fyri at stuðla USA í at loypa á Irak, ber ikki til at fara meira skeivur enn akkurát har, vísir Thorbjørn Brochs á.

Hann leggur dent á, at tað á ongan hátt skal skiljast sum, at hann styðjar stýrið í Irak ella Saddam Hussain, og tað gera adventistarnir soleiðis yvirhøvur heldur ikki, sigur hann. Kanska hava Fólkaflokkurin og Óli Breckmann, sum undirskrivaði bræv teirra, rætt í fleiri førum, men her fara teir skeivir, vísir Thorbjørn Brochs á.

Brævið, sum Fólkaflokkurin hevur sent forsætisráðharranum, stendur á heimasíðu Fólkafloksins og verður her endurgivið orðarætt av heimasíðuni:

*»Statsministeren,*
*Ha. Andeers Fogh Rasmussen, MF,*
*Christiansborg*
*1218 København K*

### Støtte til USAs holdning til Irak

*Folkeflokken ønsker hermed at tilstede den støtte, som De på vegne af Danmarks regering sammen med andre europæiske statsledere har givet Præsident Bush og den amerikanske regering i dens faste og ansvarlige holdning over for den trussle, Saddam Hussein og hans regime udgør imod fred, demokrati, trosfrihed og menneskeværd.*

*Med venlig hilsen p.v.a.*
*Folkeflokkens lagtings- og landsstyremedlemmer*

*Óli Breckmann«*

Thorbjørn Broch sigur, at fólk halda ivaleyst, at tá talan er um muslimskt land, er einki trúarfrælsi. Men hann vísir á, at høgtstandandi stjórnarlimir í Irak eru kristnir.

–Nú veit eg ikki, hvørja kirkju Tariq Assis hoyrir til, men kristin er hann. Hann var uttanríkisráðharri, men eg haldi, at hann hevur fingið eitt annað, minst líka høgt starv. Tað, sum eg haldi vera so trist, er at ein ikki er meira nágreiniligur, soleiðis at tað, ið verður sagt og skrivað, er rætt, sigur Thorbjørn Brochs.



*–Tað undrar meg , at eingin hevur víst á tað beinleiðis skeiva í grundgeving Fólkafloksins, tá væntandi trúarfrælsi í Irak verður brúkt sum grundgeving fyri stuðuli til álop á landið, sigur Thorbjørn Brochs, sum er virkin í adventistasamkomuni í Havn*

# Skriva samferðslusøgu í Vágum



*Ein fittur partur av samferðslusøguni um Vestmannasund er knýttur at Olsen familjuni í Vestmanna, sum í fýra ættarlið røkti samferðsluna um Sundið. Deksbáturin Ólavur átti sín stóra lut í heusm flutningi*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Ætlanir eru um at savna samferðslusøguna hjá Vágum og Mykinesi í bók. Fyrsta stigið varð tikið við framsýning á Vestanstevnu í Miðvági í fjør**

SØGA
*Edvard Joensen*

**Vágar:** Søgan um samferðsluna vestur í Vágar skal savnast á einum stað. Ætlanir eru um at geva eina bók út um evnið.

Ein teirra, sum hevur birt upp undir tiltakið, er Dánjal Poulsen, sum er vágamaður búsitandi í Havn. Hann er ættaður úr Vatnsoyrum.

Dánjal Poulsen sigur, at hugskotið spratt upp undir Vestanstevnuna seinast, samstundis sum Vágatunnilin var komin væl áleiðis. Samstarv varð tikið upp millum Miðvágs Fornminnisfelag og Dánjal Poulsen, og ein framsýning kom upp á Ellisheiminum á Vestanstevnu.

Tá tunnilin lat upp í desember í fjør, varð sama framsýningin sett upp aftur á Giljanesi. Hesaferð var tað Lions Club Vágar, sum stóð fyri.

Dánjal Poulsen sigur, at nú rímiliga nógv tilfar er tókt, er nærliggjandi at hugsa, at tilfarið skal gevast út í bók.

Ætlanin er at fara víða, sigur Dánjal Poulsen. Eitt er søgan um fasta sambandið, sum er áhugaverd. Men hon er bara ein heilt lítil partur av samferðslusøguni hjá vágafólki. Ætlanini er at fara langt aftur í tíðina, sigur hann.

Dánjal Poulsen leggur dent á, at ætlanin er at skriva søguna hjá øllum økinum. Tað vil siga bæði Vágum og Mykinesi. Eisini skulu smáu bygdirnar, sum verið hava í Vágum, Slættanes og Víkar, takast við, sigur hann.

Evnið verður býtt upp í fleiri partar. Bæði flutning um Vestmannasund, ta tiltiknu Vesturleið, bygdargøtur í Vágum og ikki minst flogferðsluna.

–Júst flogferðslan fær ein stóran part í hesi søguni, sigur Dánjal Poulsen.

Hóast hugskotið er komið í samstarvi við Miðvágs Fornminnafelag, eru eisini onnur áhugað í at halda fram. Eitt nú Sørvágs Bygdarsavn og einstaklingar, eins og áhugi eisini tykist vera í Sandavágs Fornminnisfelag, sigur Dánjal Poulsen.

Tað er kostnaðarmikið at fara undir slíka verkætlan, sigur hann, og tí eru umsóknir sendar stovnum og feløgum um fíggjarligan stuðul. Eitt nú hava kommunurnar í Vágum fingið áheitan um fíggjarliga stuðul, sigur Dánjal Poulsen.

**Graving**

Vit átaka okkum alt vanligt graviarbeiði við maskinu (3,5 t.) t.d. snøgga rundan um hús. Grava út fyri hjalli, bilhúsið o.s.v.

**Sp/f ENL**
**Tlf. 223717**